

# Føroysk-grønlendsk oljusamkoma í Aberdeen

**Jan Müller**

02.09.2013 - 13:47
Oljan.fo

Nú bæði Føroyar og Grønland eru umboðað á altjóða oljuráðstevnuni í Aberdeen við sjálvstøðugum básum verður skipað fyri samkomu týskvøldið á Jurys gistingarhúsinum í Aberdeen. Hetta verður gjørt sum eitt ynski frá grønlendskari síðu sum ein uppfylging av føroysku vinnuvitjanini í Grønlandi herfyri.

Grønlendskt vinnulív ynskir eins og føroyingar eitt tættari samstarv, her ikki minst á olju- og ráevniøkinum. Føroyingar eru sera hugaðir fyri at vera partur av vinnumenningini í Grønlandi komandi árini, og grønlendingar vlsa eisini føroysku oljumenningini stóran ans, nú ikki færri enn 1500 føroyingar arbeiða í hesi vinnu.

Samkoman í Aberdeen, sum er avmarkað, hevur nettupp til endamál at byggja víðari á vinnuferðina í Grønlandi og byggja brýr millum báðar tjóðirnar.